# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 24.02.2014*

**Bygdaráðsfundur  24.02.2014  kl. 16.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | Burturstødd |
| | Marjun Gaardbo skr. | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 18/2014  Ferðslumál**

J.nr. 2013-0044-0068

**Málslýsing**

Á bygdaráðsfundi 07. oktobur 2013 gav kommunan MEST loyvi til at koyra við mobilum kranum, á ávísum vegastrekkjum, í Nes kommunu. Loyvið er galdandi í eittt ár fram til 10. oktobur 2014.

Í skrivi 05. februar spyr  MEST, um tað er møguligt at loyngja hetta loyvi fram til 14. januar 2015.

**Tilmælið**

Á fundi 11.02.2014  mælir Tekniska nevnd til at leingja royndarloyvið hjá MEST.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 19/2014 Mentanarmál**

J.nr. 2014-0019-0058

**Málslýsing**

Í skrivi 28. januar 2014 søkir Nám um fíggjarligan stuðul til landsumfatandi barnabókatiltak í viku 14.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2014 mælir Mentanarnevndin frá at veita stuðul  til endamálið.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 24.02.2014*

**Mál nr. 20/2014 Mentanarmál**

J.nr. 2014-0019-0059

**Málslýsing**

Í skrivi 28. januar 2014 søkir arbeiðsbólkurin fyri Nordisk Kirkesangfest um fíggjarligan stuðul til norðurlendskan sálmafagna, sum verður í døgunum 29. mai - 1. juni 2014.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2014 mælir Mentanarnevndin til at veita stuðul á kr. 2.000,-.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 21/2014 Mentanarmál**

J.nr. 2014-0019-0060

**Málslýsing**

Ì skrivi 31. januar søkir LGBT um fíggjarligan stuðul til bókaútgávu.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2014 mælir Mentanarnevndin frá at stuðla bókaútgávuni.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 22/2014 Mentanarmál**

J.nr. 2014-0024-0022

**Málslýsing**

Í skrivi 03. februar 2014 søkir Hilmar Hansen um fíggjarligan stuðul í sambandi við venjingarlegu, í fjallasúkling, sum verður á Bornholm 29. – 31. mai 2014.

Venjingarlegan er ein liður í hansara fyrireiking til úttøkuna til Oyggjaleikirnar, sum verða í 2015.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2014 mælir Mentanarnevndin til at veita stuðul á kr. 2.000,-.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 24.02.2014*

**Mál nr. 23/2014 Mentanarmál**
J.nr.2014-0023-0140
**Málslýsing**
Í skrivi 06. februar 2014 søkja lærararnir á Skúlanum á Trøðni um fíggjarligan stuðul til námsferð til Ísland, í døgunum 31. mars til 03. apríl 2014.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2014 mælir Mentanarnevndin frá at játta stuðul til endamálið.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 24/2014 – Trivnaðarmál**
J.nr. 2014-0031-0148
**Málslýsing**
Í skrivi 04. februar 2014 biðjur barnagarðurin um at fáa játtaðar 20 tímar um vikuna, til serligan tørv, fram til summarferiuna.

**Tilmælir**
Á fundi 13.02.2014 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Barnagarðinum 20 tímar, til serligan tørv, fram til summarferiuna.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin fer av konto børn við serligum tørvi í Barnagarðinum.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 25/2014 Trivnaðarmál**
J.nr. 2014-0031-0149
**Málslýsing**
Í skrivi 13. februar 2014 søkja tveir heimasjúkrarøktarfrøðingar, í Heimatænastuni øki 3, um fíggjarligan stuðul til skeiðluttøku í Danmark.

**Tilmælir**
Á fundi 13.02.2014 mælir Trivnaðarnevndin frá at veita stuðul grundað á, at Heimatænastan ikki er ábyrgdarøkið hjá kommununi.

Á fundi 18.02.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.